## Figo: Real skuldi skamma seg

Luis Figo, sum einaferð var keyptur fyri ovurhondsstóra upphædd av Real Madrid, heldur lítið um seinastu handlarnar hjá spanska felagnum. - Í hesum krepputíðum er tað skomm, at Real Madrid brúkar so nógvar pengar til at keypa tveir spælarar fyri, sigur Figo. Í 2000 varð Figo seldur frá Barcelona til Real Madrid fyri umleið 450 milliónir krónur.



## Milan skal hava yngri lið

Ítróttarstjórin í italska felagnum AC Milan sigur, at felagið nú roynir at manna eitt yngri lið, enn felagið hevur havt seinnu árini. Felagið hevur seinastu vikurnar keypt nakrar spælarar, sum eru fyrst í 20'unum, og tað er tilvitað av felagnum. - Vit royna at byggja eitt yngri lið upp, sum eisini gevur okkum fíggjarligan frið at reka felagið, sigur ítróttarstjóri Galliani við Ansa.

# Tolin trívst á Tvøroyri



*Fagnaðurin var stórur, tá tað loksins eydnaðist at basa Riddaranum, sum seinna partin av árinum í fjør og á norðoyastevnu kom fyrstur á mál*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Púra óvæntað sigraði Tvørabáturin á Riddaranum, sum hevur vunnið fimm tær seinastu ferðirnar**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Teir hava verið tolnir á Tvøroyri. Tvørabáturin hevur verið drúgvur í at taka lut, síðani teir á Tvøroyri bjóðaðu seg fyrstu ferð fram við 6-mannafari í 2007. Fleiri ferðir hava teir verið tætt við at vunnið, men oftast hava marginalirnir ikki verið við, og Tvørabáturin er komin á mál sum nummar tvey og trý og onkra ferðina nummar fýra.

Síðsti sigurin var á Sundalagsstevnu í 2007, tá ið Tvørabáturin var ein tumma ella so frammanfyri Sundabátin.

Á Norðoyastevnu var Tvørabáturin eina bátslongd aftanfyri Riddaran. Miðvingar høvdu vunnið fýra tær seinastu róðrarnar og harvið FM heiti í fjør. Tí bendi einki á, at tað leygardagin á Skála skuldi verða so nógv øðrvísi.

Men teir á Tvøroyri vildu tað øðrvísi. Í Klaksvík varð Tvørabáturin sektaður, tí starturin var so trilvandi. Á Skála var tilvitanin stór um, at starturin skuldi verða øðrvísi, og tað eydnaðist.

Tvørabáturin leyp avstað og legði seg beinanvegin á odda. Í miðróðrinum hótti Riddarin, og so tóktist tað sum um, at søgan frá nógvu teimum undanfarnu ferðunum skuldi endurtaka seg.

Soleiðis endaði tað ikki. Tvørabáturin svaraði sannførandi aftur, og á málinum var munurin tað mesta av einari bátslongd.

Ei undur í at tað varð skipað fyri stórari móttøku á Krambatanga, tá ið Smyril leygarkvøldið kom suður. Fólkið var nógv, 10-mannafarið Suðuroyingur var flotaður at taka ímóti, og við Suðuroyarportalin segði róðursmaðurin á Tvørabátinum Jacob Eidesgaard:

– Hetta er bara ein fantastisk móttøka, ið eggjar okkum til at gera enn meira við kappróðurin.

Sambært Suðurrás er Tvørabáturin mannaður við seks rógvarum av Tvøroyri og einum úr Fámjin.



*Gongurólvur fekk harða kapping á fjarðastevnum, men eins og á norðoyastevnu komu tær fyrstar á mál*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Gongurólvur í harðari kapping

**Avbjóðarin var nýggjur, og sigurin hesa ferð var ikki so tryggur, sum hann var tað á norðoyastevnu**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Einasti báturin hjá sigursvanda Havnar Róðrarfelag, sum vann á norðoyastevnu, var Gongurólvur við kvinnumanning.

Soleiðis var tað eisini á fjarðastevnu á Skála. Gongurólvur við kvinnum var fyrstur á mál. Munurin millum róðurin í Klaksvík og á Skála var, at hesa ferð var tað tættari millum tveir teir fremstu bátarnar, enn tað var á Skála, og at tað hesa ferð var annar avbjóðari til Gongurólv, enn tað var í Klaksvík.

Gongurólvur var tvey sekund fyrri á mál enn Sølmunduránorðoyastevnu. Á fjarðastevnu var Gongurólvur eftir sera tættan og spennandi endaspurt bara brøkpartar av einum sekundi fyrri á mál enn Páll Fangi.

Spurningurin er nú, hvussu tað fer at hilnast hjá Gongurólvi, Páll Fanga og Sølmundi á sundalagsstevnu, sum leygardagin verður í Kollafirði.

Úrslitini higartil kundu bent á, at tað er lagt upp til tætta kapping. Favorittur at vinna bæði í Kollafirði og FM er Gongurólvur.

## Argjamenn ímóti argjamonnum

**Eingin kapping er um FM, og nú bjóða argjamenn umborð á Árnfirðingi Argjabátinum av**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tølini siga, at tað er eingin kapping um FM. Argjabáturin hevur ikki vunnið FM síðani 2004, men í ár verður tað. Eingin ivi er um tað. Argjabáturin rør væl, og eingin annar bátur tykist hava førleika at bjóða Argjabátinum av.

Á Skála var Árnfirðingur, sum ikki luttók á norðoyastevnu, næstfremstur. Munurin frá Argjabátinum og aftur til Árnfirðing var minni, enn hann á norðoyastevnu var frá Argjabátinum og aftur til Ørv. Í báðum førum var munurin so stórur, at talan als ikki var um kapping.

Árnfirðingur er sjálvandi úr Árnafirði. Men Árnfirðingur sæst venja á Havnarvág. Tað eru fyri tað mesta limir í Argja Róðrarfelag, sum manna bátin. Nógvir av teimum vóru umborð á 6-mannafarinum Lómi á norðoyastevnu.



*Aftur hesa ferð var talan um uppvísingarroður hjá argjamonnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*